# Fimleikurin blómar og støkkur avstað

## Fimleikafelagið Støkk hevur í ár havt fleiri íðkandi limir enn nakrantíð áður


Kvinnurnar í estetiskum fimleiki hava júst luttikið í HM í Kanada

Við 700 íðkandi limum úr nærum øllum bygdum í Eysturoynni og úr nøkrum bygdum í Norðurstreymoy, má sigast, at felagið stendur í besta blóma.

Á Eystanstevnu fer Støkk at hava fimleikaframsýning seinnapartin sunnudagin, har nógvur góður og fjølbroyttur fimleikur verður at síggja, eins og Silvi og Silvabilurin fara at luttaka.

Liðini, sum luttaka á framsýningina verða fleiri í tali. M.a. fittur barnafimleikur, góður amboðsfimleikur og yndisligur estetiskur fimleikur.

Framsýningin varar í ein tíma, samstundis sum køkutombola verður í gongini í ítróttarhøllini.

### Fleiri FM-heiti

Aftur í ár hevur verið kappast í estetiskum fimleiki, og har fekk Støkk sera góð úrslit.


Kvinnurnar í amboðsfimleiki luttóku í NM í Norra í mai mánað

Bæði gentur og kvinnuunglingar gjørdust føroyameistarar og pinkur, smágentur og kvinnur vunnu silvur.

Fleiri gullmerki vórðu eisini vunnin í estetisku steypakappingunum í vetur, so hetta hevur verið eitt sera gott ár fyri estetiska fimleikin í Støkk.

Í apríl mánaði vóru gentur og kvinnuunglingar í Prag og luttóku í altjóða kapping innan estetiskan fimleik. Hetta var ein sera læruríkur túrur fyri hesar ungu fimleikararnar.

Fyrst í juni mánaði luttóku kvinnurnar hjá Støkk í HM í Kanada. Hóast støðið í hesi kapping er sera høgt, megnaðu kvinnurnar at fáa eitt 22. pláss av 27 luttakandi liðum.

Í amboðsfimleiki vann Støkk eitt FM-heiti fyri einstaklingar og tvey fyri lið. Harumframt eru fleiri heiðursmerki vunnin í kappingunum, sum hava verið í vetur.

So sigast má, at felagið hevur nógvar sera dugnaligar fimleikarar. Hetta dugnasemið vísir seg eisini í landsliðshópinum innan amboðsfimleik.

Her mannar Støkk alt kvinnuliðið og landsliðsvenjarin hjá teimum er eisini úr Støkk. Landsliðið luttók í NM í Norra í mai mánaði, og hóast einki heiðursmerki kom burturúr, vóru kvinnurnar væl nøgdar við úrslitið.

Bæði innan estetiska- og amboðsfimleikin hevur Støkk fingið hjálp frá útlendskum venjarum og koreografum. Hetta er sera týdningarmikið fyri menningina innan fimleikin.


Nýggja Støkkhøllin fer at geva fimleikinum munandi betri karmar

## Nýggj Støkkhøll

**Eitt felag við so nógvum íðkandi limum seta sjálvandi stór krøv til venjingarumstøðurnar.**

**Arbeitt hevur leingi verið við ætlanunum um eina nýggja Støkkhøll og er nú verulig gongd komin í.**

**Í nýggju høllini verða sera góðar umstøður til amboðsfimleik, estetiskan fimleik og breiddarfimleik.**